# Eitt sindur um setningar.

*Eftir Robert Joensen.*

## A. INNGANGUR

Um føroyingar sigur Lucas Debes (1673), at sambært fornan sið fekk hvør einstakur ávísan verð av mati býttan til máltíðirnar, og arbeiði viðvíkjandi høvdu teir setning.

Arbeiðslagið í Føroyum á bø og í haga stóð við so at siga óbroytt í fleiri øldir og til seinrapartin av 19. øld, og tað, at maturin varð býttur, stóð við á summum bóndagørðum, serstakliga hvat ið viðskera viðvíkti, til út ímóti 1900. Gomul kona (T.)[1], sum var uppvaksin á bygd 1865—80, segði mær, at soleiðis var, tað hon kundi minnast, at hann, sum leivdi av mati sínum frá einari máltíð, setti hetta upp á bitan, sum hann ella hon kundi fáa sær, tá ið tað hóskaði, og kjøt varð altíð býtt til hvønn einstakan til máltíðirnar. Maður borin í heim í 1877 (K.) segði, at hann mintist, at tá ið ræst kjøt varð kókað, so varð býtt til hvønn einstakan. Sama var, tá ið skerpukjøt var til viðskerar, og tað var mest sum hvønn dag á bóndagarði. Krovið varð sundurstykkjað. Síðani varð rópt upp. Tað er at kasta lut á tann hátt, at ein vendi sær ímóti vegginum ella bróstinum, meðan bóndin ella bóndakonan peik-

---

[1]) Umframt tilfar úr teimum bókum, sum nevndar eru seinast í hesari ritgerð, er eisini nýtt tilfar, sum eg havi skrivað upp eftir frásøgumonnum. Bygdin, haðani tilíkt tilfar er nýtt, er skrivað stytt í hesari ritgerð, og eru tær hesar: D. = Dalur; E. = Eiði; H. = Hattarvík; Ho. = Hoyvík; K. = Klaksvík; Kf. = Kollafjørður; N. = Norðoyri; O. = Oyndarfjørður; S. = Svínoy: Sa. = Sandvík; T. = Tórshavn.

aði á eitt stykki og spurdi: »Hvør skal hava hetta?», og og so nevndi hin, sum rópti upp og ikki sá, hvat stykkið, ið peikað varð á, hvør ið skuldi hava tað. Og soleiðis var hildið áfram, til hvør hevði fingið sítt stykki av kjøti. Síðani gjørdi hvør við part sín, sum hann vildi. Hann ella hon, sum fingið hevði mest av soltnum, eitt nú langleggin, kundi javna við hann ella hana, sum fingið hevði válgaran ella annað feitt stykki. MARIA SKYLV HANSEN (1950) nemur eisini við hetta, har hon sigur frá einari konu, at tá ið hon býtti viðskera, fingu tey eitt stykki av kjøti; var tað gás, fingu tey ein fjórðing í part; tey kundu so drýggja sær tað, sum tey vildu. – Eisini drýlurin varð býttur til matna (JIRLOW 1931, samanber LANDT 1800). SVABO (1781–1782) sigur, at 3 lundar vóru mansverður, somuleiðis 20 lundahøvd við krikunum.

Verðirnir hjá fedrunum er burturav rúgvismikið evni, sum ikki skal viðgerast her. – Tó skal eg vísa á gomul orð, sum hvørt sær ber í sær søgutátt, eitt nú verðardrýlur, fjallmatur, fjallkjøt, verðarfiskur. Tá ið kjøt var býtt til viðskera, so er at viðmerkja, at hesin siður stóð við á summum fiskiskipum føroyinga til um leið 1930. Gamal fiskimaður (S.) sigur, at á skipum, hann var við, stykkjaði bestimaðurin vanliga sundur krovið. Og so varð rópt upp til at avgera, hvat stykki hvør skipsmaður skuldi hava. – Hesi dømi burtur úr mongum øðrum sýna, at føroyingar í langa tíð eftir døgum Lucas Debesar fingu vissa nøgd av mati til máltíðirnar.

## B. SETNINGAR

ØSTBERG (1922) hevur skrivað eitt brot um føroysku setningarnar. Hann sigur, at dagssetningur var tað ávísa arbeiði, sum sambært royndir og sið var hóskandi hjá einum tilkomnum, arbeiðsførum fólki at fáa frá hondini sum dagsverk. Kvøldsetningur var tann arbeiðisnøgd, ein skuldi avrika eitt vetrarkvøld. – Soleiðis, sum ØSTBERG skýrir orðini

dagssetning og kvøldsetning, hava føroyingar mær kunnugt nýtt hesi orð (samanber um setning eisini Jacobsen og Matras 1961).

Hitt gamla føroyska bóndasamfelagið, soleiðis sum arbeiðislagið var, áðrenn broyting kom í eftir 1856 og enn meira eftir 1872, roknaði dagin at vera frá klokkan 6 á morni til klokkan 6 á kvøldi (sjá Landt 1800 og Evensen 1907). Bóndi í heimbygd mínari (K.), sum var upp á tað besta frá 1865 til út ímóti 1900, og sum ongantíð fekst við annað arbeiði uttan bóndaskap og útróður, hevði tann sið, at tá ið menn skuldu í hagan at arbeiða, eitt nú í torv, skera upp haga og annað meiri (fjallgonga ikki íroknað), so skuldi farast av garði kl. 6 á morni, og teir skuldu vera afturkomnir í roykstovuna klokkan 6 á kvøldi. Og hesin bóndin helt fast við hetta alla ævi sína. Sambært tað, sum sagt verður um kvøldsetning (sjá seinri), tykjast teir fyrr at hava roknað arbeiðstíðina ein vetrardag frá klokkan 9 á morni til klokkan 9 á kvøldi. Tað vanliga man hava verið, at teir fyrr hava roknað arbeiðsdagin 12 tímar. Tó verður sagt úr Vágum (Rasmussen 1949), at har var arbeiðsdagurin einar 16 tímar.

## 1. *Tøting.*

At *karða* og *spinna* roknaðist at vera mannfólkaarbeiði (Landt 1800); og soleiðis var heilt út ímóti 1900, ið hvussu er, sjálvt um orðatakið sigur »at neyð lærur nakna konu at spinna«.

Elsta amboð at spinna við, sum vit vita um í Føroyum, er handsnældan, og verða renlar eisini funnir at siga í øllum útgrefstrum (Dahl 1955). Handsnældur kundu vera ymiskar á útsjónd og stødd alt eftir tí, ið spunnið skuldi verða á teimum, og tí hava teir fyrr kallað handsnældur við tí heiti, tær vórðu nýttar til, eitt nú reipsnælda, garnasnælda, haftsnælda, bandasnælda ella togsnælda. — Hand-

snældan verður í ymsum førum nýtt enn (Svabo 1781–82, Joensen 1960).

Søgnin sigur, at knútur í Skálabotni var fyrsti maður í Føroyum, sum átti karðar. Hann man hava livað um ár 1600 ella í fyrraparti av 17. øld (Weihe 1933–34, samanber Degn 1945). Áðrenn karðarnir komu til nýtslu, nýttu menn tókambar við skafti at greiða ullina við. Og so varð spunnið. – Søgnin um, at karðarnir ikki vórðu tiknir til nýtslu í Føroyum fyrr enn um ár 1600, kann mistaka seg, men hildið verður, at karðarnir heldur seint hava loyst av tókambarnar (Jirlow 1931).

Tá ið her verður talað um at spinna, so meinast at spunnið verður á hjólrokki (»skotrokki«), sum var vanligur um allar Føroyar til um leið 1920, og ymsastaðni í Føroyum hevur tílíkt strá staðið uppi til dags í dag.

Søgumenn tykjast at vera samdir um, at hjólrokkurin kom til Føroya úr Hetlandi út ímóti 1700, tá ið fólk úr Hetlandi komu til Føroya at læra menn at spinna, men verður eisini sagt, at hesin rokkur fyrr hevði verið nýttur í Føroyum, men varð burturlagdur, so at menn høvdu gloymt, hvussu hesi amboð skuldu nýtast (Svabo 1781–82, Landt 1800, Jirlow 1931; samanber Weihe 1933–34). Svabo hevur greidliga greitt frá, hvussu hetta spunalag sá út. Vert er at geva gætur, at føroyingar hava *staðið* og spunnið, meðan skotar hava *sitið* og spunnið. Atvoldin til hetta man helst vera tann, at trongligt var í húsum føroyinga fyrr, og at teir tí ikki hava havt rokk mitt úti á gólvinum, uttan endiliga neyðugt. Og skuldi maður sita og spinna, so mátti hann helst vera út frá bróstinum ella vegginum. Neyvan er nakar strábonkur í Føroyum, sum gjørdur er soleiðis, at maður skuldi sita og spinna. Í Orknoyum havi eg sæð spunalag av somu útsjónd sum hjólrokkurin, sum nýttur var í mínum barnaheimi, men strábonkurin á hesum spunalagi í Orknoyum var nógv lægri, og var hann eisini stytri. Tað var neyðugt, at strábonkurin var lægri, og at stutt var ímillum rokk og snældu, tá ið

maður skuldi sita og spinna. – Spunaløgini í roykstovuni vóru fram við vegginum. Ofta var rokkurin í rokkhaldi (S.) ella í nokkakleystri[1]) á vegginum (Kf.). Tann einasti, sum í roykstovu, har fleiri spunaløg gingu, stóð mitt á gólvinum og spann, var fínspinnarin. Fínspinnararnir vóru bestu spunamenn; teir spunnu fínt garn, eitt nú kotagarn og skjúrtagarn (skjúrtagarn var garn at veva til konufólkaskjúrt), og tí skuldu teir vera har, sum ljósast var. Stundum høvdu teir hvítt undir favninum, fyri at sjónskari skuldi vera (H. – K.).

Tá ið menn skuldu spinna sín dagssetning, skuldi ullin vera greið á skinninum, og vil tað siga, at ullin skuldi ikki vera samanfløkt. Upp í setningin, sum ein skuldi spinna, hoyrdi fyrst at karða ullina, og tá ið liðugt var at spinna, skuldi vindast saman (S. – K.).

Ein húskallur skuldi spinna 2 pund[2]) av ull. Tað var setningurin (LUCAS DEBES 1673), men Svabo nevnir, at roknað var við, at maður í mesta lagi spann 2 pund um dagin (SVABO 1781–82, útg. 1959), og LANDT (1800) sigur, at ein húskallur á hjólrokki, sum á hansara tíð vanliga varð nýttur í Føroyum, dagliga kundi karða og spinna 2 pund av ull til tær sonevndu hálvfínu hosur (t. e. »Soldater-Hoser«). Teir eru ikki fáir, sum kunnu spinna 2 1/2 til 3 pund um dagin, og tá skulu teir umframt hava aðrar frágerðir, eitt nú at bera torv til dagliga nýtslu og at draga hoyggj til neytini (LANDT 1800). ØSTBERG (1922) sigur, at maður skal spinna 4 merkur[3]) av ull um dagin, bera inn torv til dagliga nýtslu og geva neytunum tað hoyggj, teimum er fyri neyðini.

Viðvíkjandi samanvindingini er at siga, at tá ið maður hevði spunnið eina snældu, so varð hon ofta sett á smoyggju-

---

1) *Rasmussen* (1949) sigur *rokkasetur*.

2) Eitt pund = 2 merkur = 1/2 kilogram. (Øll gomul mát, sum her eru lýst við nútíðar mátum, eru úr Álmanakkanum 1963, ritstjóri: *John Davidsen*.

3) Ein mørk = 250 gram.

pinn ella tópinn. Hesir pinnar vóru gjørdir soleiðis, at teir hóskaðu at stinga upp í eina nýspunnað snældu, og summir tópinnar høvdu blað í endanum niður undan breiðara enda á tósnælduni, meðan aðrir vóru rundir her ella spískir, og vóru teir soskikkaðir, alt eftir hvørjum háttalagi samanvindingin skuldi greiðast úr hondum.

Tá ið maður skuldi vinda saman til trítrátt, so vant hann av 3 snældum ísenn upp í noða. Í støðum nýttu menn ein butt til samanvindingar (S.—E.—Sa.). Ein buttur var ein fjøl við holum í at seta tópinnarnar við snældunum í, so tær stóðu fastar, meðan maður vant saman. Úr Sandvík havi eg gjørt mær eina avmynd av einum gomlum butti, og er hann 17 cm hvønn vegin og um leið 5 cm tjúkkur. Í honum eru brend 3 hol á skák niður í hann; líka langt er ímillum hesi hol, sum skapa ein trýhyrning. Hesin buttur er sostatt nýttur til samanvindingar av trimum snældum, trítrátt, og tópinnarnir vóru í hesum føri uttan blað[1]). Maður kundi eisini vinda saman við at hava ein tópinn við snældu stungnan niður ímillum húðaskógvin ella rotuskógvin og fótin, og hava tveir stungnar inn ímillum stráið og strábonkin. Í hesum føri høvdu tópinnarnir blað, men settu teir tópinnarnar við snældum í soppatorvu[2]), tá ið teir vundu saman, so vóru teir spískir í endunum (S.).

Burturúr hesum verður úrslitið, at tann vanligi setningurin hjá manni ella húskalli at karða, spinna og vinda saman ein dag afturat ymsum frágerðum var at fáa 4 merkur ella 2 pund av ull frá hondini.

---

1) Á Eiði verður sagt: »Fjølin, sum vit høvdu at seta smoyggingarpinnarnar í, var ein tjúkk fjøl, sum vit kallaðu »foxið«. Øðrumegin var spælið »fox and geese«, og tann síðan vendi niður, tá ið fjølin varð nýtt sum buttur til samanvindingar.«

2) Úr Svínoy verður sagt: »Eg havi sæð konu, sum fór at vinda saman, taka 2 soppatorvur, sum hon legði á gólvið. Hon stakk smoyggingarpinnar við snældum á í torvurnar, styðjaði tær við fótunum, og so vant hon saman.«

Vanligt var fyrr, at konufólk, tá ið tey fóru til neytar, høvdu stokkar við sær og *bundu*, meðan gingið varð fram og aftur (Rasmussen 1949, Bruun 1929), og tykist hetta at hava verið gamal siður. Søgn er eisini um, at neytakona spann á handsnældu, meðan hon gekk til neytar (K.).

Lucas Debes (1673) sigur, at ein arbeiðskona ella ein kvinna skuldi binda 2 pund av spunnari ull um dagin til eitt hosupar, og Svabo (1781–1782) skrivar, at arbeiðskonan bant eina hosu um dagin, tá ið hon umframt hevði annað húsligt arbeiði at takast við; men tá ið hon einans bant, skuldi hon binda hosuparið. Tær, sum bundu skjótast, kundu binda 3 hosur ein dag. Hann sigur, at hesar hosur vóru tær vanligu tá á døgum, sum bundnar vórðu til avreiðingar, og vóru tær eina (62,8 cm) til eina og ein fjórðing alin (78,5 cm) til longdar. Landt (1800) sigur hetta sama og skilar til, at tað ikki var heilt sjáldsamt, at eisini mannfólk bundu hosur, og vóru teir í hesum verki ikki eftirbátar í mun til konufólkini.

Østberg (1922) sigur, at tilkomið konufólk skuldi binda eina tvíbundna troyggju um dagin. Vanliga bundu tvey konufólk bulin í felag[1]), og skuldu tær báðar sostatt binda tvær troyggjur um dagin. Rasmussen (1949), sigur, at fýramarkatroyggja var dagsverk, og Maria Skylv Hansen (1950) sigur, at umframt tað, ið frá var at gera, skuldi arbeiðskonan í køkinum saman við einari av hinum arbeiðskonunum leggja tólv troyggjubular úr hondum um vikuna.

Fólk á ymsum bóndagørðum siga enn hetta sama, uttan at vita, hvat aðrir hava skrivað um evnið. Í einari bygd (N.) verður nú sagt, at tvey konufólk skuldu fyrr binda tveir troyggjubular um dagin; tað var dagssetningurin. Skilað verður til í hesum viðfangi, at bundu tvey konufólk tveir bular, høvdu tey umframt aðrar frágerðir. Úr Sandoy (D.), verður nú greitt frá, at fyrr skuldi konufólk binda troyggjubul ella 3 troyggjuermar sum dagsverk.

1) Tá ið konufólk bundu troyggjubul, nýttu tey 10 stokkar.

Gomul bóndakona (K.) sigur, at hon sum barn minnist, at onkur gomul arbeiðskona bant 2 troyggjuermar ein dag. Tá ið børnini vóru niðurfarin, setti mamman og ein arbeiðskona seg við troyggjubulinum, og fóru tær ikki niður, fyrr enn bulurin var bundin. Soleiðis kom ein troyggja í hennara heimi at verða úr hondum greidd hvønn dag á vetri, og var hetta út ímóti 1900.

Í síni heild hevur setningurin binding viðvíkjandi verið tann, at kvinna skuldi binda eitt tvípundshosupar ella ein troyggjubul um dagin stundum umframt aðrar frágerðir.

## 2. *Vevnaður.*

Hin gamli føroyski vevurin[1]) ella vevstaðurin var hildin at vera vánaligt amboð (SVABO 1781—1782, samanber LANDT 1800), og tí er vist lættari hjá okkum at skilja, tá ið fyrr varð tikið til, at »vevkonan og fjallmaðurin eru bæði líka móð á kvøldinum« (JACOBSEN 1928).

Stutt fyri ár 1800 kom nýggjur vevur at avloysa hin gamla føroyska klíggjavevin. Í 1814 vóru 34 nýggir vevir komnir, og í 1826 vóru 123 tílíkir í landinum, har allir uttan tann eini vóru gjørdir í Føroyum (DEGN 1929). Eftir hetta hvarv klíggjavevurin so líðandi. Roknað var við, at vevkonan í klíggjavevinum kundi veva ein heilan dag 1 til 1½ alin (62,8—94,2 cm) av vaðmáli. Vevkonurnar vóru fáar, og bert ullint varð vovið (SVABO 1781—1782). Eftir hesum tykist dagssetningurin at hava verið at veva í mesta lagi 1½ alin (94,2 cm) av vaðmáli í longd, meðan breiddin ikki er tilskilað. HANS MICHAEL JACOBSEN (1928) sigur, at tað breiðasta, tey kundu veva í teim gomlu føroysku vevunum, og tað var klíggjavevurin, var so breitt, sum rivurin var langur. Vanliga var rivurin[2]) ein góðan

---

[1]) Sjá Varðan bind 8, bls. 187—191 1928, har *Hans Michael Jacobsen* hevur skrivað um gamla føroyska vevin.

[2]) *Rivurin* svarar til váðmálsbummin á nútíðarvevi (*Jacobsen* 1928).

favn (1,8 m) langur, og vanliga breiddin, ið vovin var, var bula- og brókabreidd, um leið 2 alin (1,26 m). Eftir at nýggi vevurin var komin, hevði vevkonan eisini dagssetning. MARIA SKYLV HANSEN (1950) tekur soleiðis til, at tá ið vevnaður var fyri, skuldi vevkonan greiða úr hondum eitt vist arbeiði um vikuna.

### 3. *Kornvelting.*

Tá ið menn fyrr í tíðini og til út ímóti seinra parti av 19. øld talaðu um at velta, so meintu teir at *velta korn*. Og tá ið her verður talað um setning í samband við at velta, so er tað frá teirri tíðini, tá ið teir reinaveltu[1]).

Veltingaramboðini vóru hakin[2]), sum kendur hevur verið av øllum føroyingum til dags í dag. Haki, ella veltingarhaki, var vanliga sagt um veltingaramboð mansins, og tá ið menn gjørdu haka lættari enn vanligt at nýta hjá konufólki at saksa við, var hesin róptur saksingarhaki (JIRLOW 1931).

Kornið, sum teir fyrr sáddu ella dyrkaðu í Føroyum, var einans bygg (DEBES 1673, útg. 1950). Trýggir kannubærar[3]) av frækorni fóru í eitt tunnulendi[4]), trý byggkorn undir fótin (MARIA SKYLV HANSEN 1950).

SVABO (1781–1782) sigur, at søgn er, at maður skuldi velta eitt tunnulendi um dagin, men her veldst um, hvussu góð jørðin er at velta, hvussu dúgligur húskallurin er, og hvussu sterkur hann er. Eitt tunnulendi er tann vídd, sum í akurskurðartíð skuldi geva eina tunnu av korni (SVABO 1781–1782, útg. 1959, RASMUSSEN 1949). – LANDT (1800)

---

[1]) Sjá *Lucas Debes* 1673, útg. 1950, bls. 117; *Svabo* 1781–1782. útg. 1959, bls. 334 ff.; *Landt* 1800, bls. 304 ff.; *Bruun* 1929, bls. 184–186; *Rasmussen* 1949, bls. 4 ff.

[2]) Mynd av haka sæst hjá *Svabo* 1781–1782, útg. 1959, bls. 137; *Bruun* 1929, bls. 187; *Jirlow* 1931, bls. 114.

[3]) Ein kannubæri = o. u. 0,003 hl.

[4]) Eitt tunnulendi = 350 $m^2$.

sigur somuleiðis, at sambært vanliga frásøgn skuldi ein húskallur sum dagsverk velta so stóra vídd, sum um heystið gav eina tunnu av korni, og skilar hann til – eins og Svabo – at eitt hálvt tunnulendi man vera tað mesta, ein kann rokna við sum dagsgerð, tá ið húskallur skal velta korn. Østberg (1922) sigur, at dagsverkið hjá manni var at velta eitt tunnulendi, og somuleiðis var tað dagssetningur hjá manni at saksa eitt tunnulendi.

Uttan iva man tað ikki hava verið møguligt yvirhøvur í Føroyum fyrr í tíðini at áseta, at setningurin velting viðvíkjandi sum dagsgerð skuldi vera tunnulendi. Men hesin setningur er nevndur av so mongum, at uttan iva hevur verið roynt at seta tílíkan setning fyri, tá ið menn veltu, og í summum bygdum man hetta hava verið setningur, dagsverk.

## 4. *Kornarbeiði.*

Tá ið kornarbeiði[1]) var fyri, eru setningar at nevna í samband við at *skera akur*, at *ripa* og at *lata av sorni*.

Akurknívurin, sum nýttur var út ímóti 1900, var sum oftast tilevnaður úr uppslitnum líggja (Rasmussen 1949), men fyrr í tíðini skóru teir við vanligum telgiknívi (Debes 1673, Svabo 1781–1782 og Landt 1800). Svabo skilar til, at hann einans visti um ein mann í øllum Føroyum, sum nýtti akurknív av útlendskum sniði, eina sigd (samanber Rasmussen 1949).

Í Sandoy roknaðu teir 18 bundi til eina tunnu av korni, í Sumba 8 og í Vágum 12 til 14 bundi. Í Porkeri roknaðist raskur húskallur at skera 12 bundi um dagin, og í Vágum kundi maður í tjúkkum og góðum akri skera 10–12 bundi um dagin, men ikki í tunnum akri (Svabo 1781–1782). Eftir hesum at døma skar maður um leið til

1) Kornarbeiði viðvíkjandi verður víst til *Landt* 1800, bls. 312 ff. *Rasmussen* 1949, bls. 73 ff; *Maria Skylv Hansen* 1950, bls. 23 ff.

eina tunnu av korni sum dagsverk. ØSTBERG (1922) sigur, at dagssetningurin var at skera eitt tunnulendi (350 $m^2$) av akri.

Riparin[1]) til at ríva øksini av stránum við tykist ikki at vera gamal í Føroyum, tá ið bæði TARNOVIUS (1669) og DEBES (1673) siga, at kornøksini vórðu rivin av stránum við berum hondum. SVABO (1781–1782) sigur, at riparin var ikki nýttur allastaðni í Føroyum. Við berum hondum kundi maður fáa øksini av 3–5 kornbundum um dagin, men við ripara av 20–30 bundum um dagin, men tá mátti 2 fólk vera honum til hjálpar. ØSTBERG (1922) sigur, at dagssetningur hjá manni var at ripa so mikið, sum gav eina tunnu av korni.

Tá ið øksini høvdu ligið til terra í sornhúsinum, varð farið at lata av sorni, sum var at treskja og at tína. Bæði DEBES (1673) og LANDT (1800) nevna, at konufólkini tresktu korn við at traðka og trampa í øksini, til byggkornini vóru leys. JIRLOW (1931) vísir á, at orðið at »treskja« upprunaliga merkir at traðka ella trampa. Hann nevnir, at út ímóti 1800 hava tey í Føroyum skóleys treskt[2]) kornið, ístaðin fyri at nýta treskitræ. Sama hevur verið gjørt í Hetlandi, sigur JIRLOW, og vil hann halda, at kornarbeiðinum viðvíkjandi hevur forngermanskt háttalag verið varðveitt í Føroyum í langa tíð. – SVABO (1781 – 1782) sigur, at tað var ikki heilt sjáldsamt, at fátækrafólk tresktu við einum avlangum steini. – Tá ið her verður nevnt um dagsverk ella setning í samband við at lata av sorni, er tað frá teirri tíðini, tá ið treskitræið varð nýtt (sjá RASMUSSEN 1949). Sambært ØSTBERG (1922) arbeiddu 3 konufólk í felag, tá ið latið varð av sorni. Tær lógu á knæ við treskitrøum og tresktu, til byggkornini vóru leys

[1]) Mynd av ripara sæst hjá *Jirlow* 1931, bls. 116. Hetta var riparin, sum nýttur varð til eftir ár 1900. *Petersen* (1963, bls. 193) sigur, at *Hans Jacobsen Debes*, løgmaður (f. 1722, d. 1769, løgmaður frá 1755 –1769) fann uppá riparan.

[2]) Mynd av treskitræ sæst hjá *Jirlow* 1931, bls. 118; *Rasmussen* 1949, bls. 78.

úr øksum. Tá fóru tær at tína við tíningartrogi. Dags-setningurin var, at 3 konufólk skuldu treskja og tína 3 tunnur av korni, og var dagssetningurin sostatt tunna[1]) av korni hjá einum konufólki at treskja og tína ein dag.

### 5. *Torvskurður.*

Við tað at Føroyar eru og hava verið skógarleysar, noyddust menn at *skera torv* og turka tað, fyri at hava eld. Torvskurður kundi verið komin úr Noregi, men mestur man hann vera komin sunnaneftir til Føroya og Íslands. Søgn er, at Orknoya-jallurin Torf-Einarr var fyrstur at skera torv á Torvnesi í Skotlandi (MATRAS 1958), og JIRLOW (1931) sigur, at nýtslan av torvi í Orknoyum skal vera komin við Torf-Einari, men MARWICK (1951) heldur tað vera rættiliga ivasamt, um tað, sum Orknoyingasøga veit at siga um Torf-Einarr, er prógv fyri, at hann lærdi orknoyingar at skera og turka torv.

TARNOVIUS (1669) skrivar um torvskurð í Føroyum, men lýsir ikki, hvussu torvarbeiðið fór fram. Hann sigur, at torvið varð flutt til húsa heim í rossleypum, men nevnir ikki, at teir bóru torv ella førdu torv til húsa heim. SVABO (1781—1782) greiðir gjølla frá torvskurði og at røkta torv, og soleiðis sum hann sigur frá, hevur arbeiðislagið yvir-høvur hildið sær so at siga óbroytt torvinum viðvíkjandi til okkara dagar. Torvskerin, sum nýttur var, hevði somu útsjónd, sum hann hevur havt til dags í dag (sjá SVABO 1781—1782, bls. 137 og BRUUN 1929, bls. 187), har menn ikki nýttu pinnagrev. SVABO sigur (1781—1782), at maður í Hetlandi kann skera tvær ferðir so nógv torv ein dag sum ein føroyingur, tí teir hava pinnagrev. Pinnagrev var ókent í Miðvági út ímóti 1900 (RASMUSSEN 1949), og JIRLOW (1931) sigur, at í Sandoy kom pinnagrevið um

---

[1]) Ein tunna av korni = 1,3912 hektolitrar.

leið 1900. – Í mínum uppvøkstri veit eg meg ikki hava sæð pinnagrev í Norðoyum. –

Ikki bara í Hetlandi var pinnagrevið vanligt í fornum døgum, men víðan um í Stórabretlandi og eisini í Frísalandi. Torvskerin er uttan iva komin til Føroya úr landsynningi (Hetlandi), og hava føroyingar eisini fingið pinnagrevið haðani (JIRLOW 1931).

Tá ið føroyingar hava skorið torv, og tá ið teir skera torv, so verður skorið næstan beint upp og niður. SVABO (1781–1782) vísir á, at á oynni Man skulu teir hava skorið torv meiri á skák enn í Føroyum, ja, skorið vatnrætt. Tað kann tykjast, at menn í Føroyum í fornum døgum hava skorið torv vatnrætt. Fyri um leið 35 árum síðani var ein torvskeri funnin á Kvíingadali á Borðoynni, og lá hann flatur í mógvi okkurt um hálvan favn undir svørðinum. Hesin torvskeri hevði einki grev og tykist ikki at hava havt nakað grev, men væl sneiddur í niðara enda á hakafótinum, gjørdur úr hørðum viði. Um so er, at menn fyrr hava skorið torv vatnrætt, so kunnu teir hava skorið omanavgrevsturin við haka ella knívi, síðani skorið spor fyri við knívi í mógvin, og tá nýtt tann grevleysa torvskeran at taka torvurnar upp úr eyganum við. Tann her nevndi torvskeri er á Føroya Fornminnissavni (*sjá 14. September, nr. 39, 1962*).

Til torvskurð hoyrdi fyrst arbeiðið at grava oman av, tínæst at skera torvið, og tá ið tað varð gjørt, varð veit grivin frá torveyganum, og so varð lagt aftur í eygað. Hetta vil siga, at omanavgrevsturin varð lagdur, har skorið varð, so at grasið kundi vaksa aftur so skjótt sum møguligt. – Har sum djúpur mógvur var, kundi verða tvískorið og eisini trýskorið (samanber SVABO 1781–1782, bls. 136). Tað, sum var skorið djúpri enn eina torvuhædd, róptu teir undirmógv (O.).

SVABO sigur, at vanligt var, at maður skar ein dag 20 til 30 klyvjar, men á Sandoynni varð roknað við, at maður skuldi kunna skera 40–50 klyvjar ein dag. Úr einari bygd

(Ho.) verður upplýst, at gamalt var, at rossabyrða langan tein var tann sama sum mansbyrða; tá er ein klyv = rokaður torvleypur.

Á Borðoynni, har verið hevur toluliga gott at skera torv, var dagssetningurin, at maður skuldi skera 40 leypar av torvi. Tá var omanavgrevstur, at leggja aftur í eygað o. tl. uppíroknað, og her eins og fremri er roknað við, at torvskerin ikki hevði pinnagrev. Vanliga var roknað so-leiðis av torvskurðarmanni, at 70 skornar torvur á longd knappliga upp á akslar á torvskera gjørdu torvleypin við turrum torvi væl rokaðan (K.). Ein annar frásøgumaður sigur, at dagssetningurin var at skera so mikið, at tað var ein bátur av torvi, og tað hava teir roknað at vera 40 leypar. Tað var eingin strævin dagssetningur at skera 40 leypar av torvi Eysturi á Skor á Borðoynni (N.).

## 6. *At royta fugl.*

Svabo (1781–1782) sigur, at arbeiðskona kundi *royta* 60 stórfuglar (lomviga og álku) um dagin, stundum meir. Maria Skylv Hansen (1950) nevnir, at aftur fyri at royta fugl, bæði lunda og lomviga, fekk og fær roytingarkona fimta hvønn fuglin, og er hetta úr Mykinesi og Nólsoy. Summar roytingarkonur í Mykinesi eru komnar upp í 250 lundar um dagin, og skilar Maria Skylv Hansen til, at um eina konu hevði hon hoyrt, sum kundi royta 12 lom-vigar um tíman. Jonsson & Linnman (1959) siga, at nóg mikið var roknað hjá einum at royta 200 lundar ein 12 tíma arbeiðisdag. Um sjálvt dagsverkið í hesum viðfangi verður sagt úr Sandoy (D.), at setningurin var, at húskallur skuldi draga 100 lundar, og arbeiðskonusetningur var at royta 100 lundar ein dag. Í bygd í Norðoyum (N.) verður upplýst, at setningurin var, at roytingarkonan skuldi royta 120 lundar ein dag, og tá hoyrdi uppí setningin, at teir vóru komnir í salt.

## 7. *Sláttur.*

Svabo (1781–1782) helt um tann føroyska *líggjan*, at hann mundi helst vera tann vánaligasti, sum nýttur varð í Norðurlondum, og Landt (1800) sigur, at føroyingar nýta smáar líggjar, og eru teir 3 korter langir, tað er 18 tummar[1]). Rasmus Rasmussen (1949) skrivar, at hin føroyski líggin, sum nýttur var um leið 1880–90, var ikki longri enn 14–15 tummar[1]) (stundum stytri), men breiddin var ávikavist stór, 4–5 tummar, og vóru tílíkir líggjar smíðaðir í smiðjuni í bygdini. Svabo (1781–1782) hevur mynd av gamla føroyska líggjanum, og sæst hon í útgávuni frá 1959 á bls. 19, Tab. III, fig. 3., og Jirlow (1931) hevur somuleiðis tekning av gamla føroyska líggjanum á bls. 108, Fig. 13, tekning 15 og 16. – Jirlow (1931) vísir á, at líggi eins og tann gamli føroyski, sum bæði Svabo, Landt og Rasmus Rasmussen nevna, og sum varð nýttur í Føroyum til um leið 1900 og í støðum eftir tað við, høvdu teir á Mainland í Hetlandi um ár 1890.

Svabo (1781–1782) sigur, at vanligt var í Vágum, at maður skuldi sláa $^1/_3$ fóður um dagin, tá ið grasið hvørki var ov tjúkt ella ov tunt. Til eitt vetrarfóður hjá neyti roknaðust 20 byrðar[2]) av hoyggi. Sostatt hevur setningurin sambært Svabo verið, at í Vágum skuldi maður sláa til slakar 7 byrðar av hoyggi ein dag. Østberg (1922) sigur, at setningurin hjá sláttumanni var at sláa ein dag til 3 sátur. Ein meðalsáta, metingarsáta, er 3 byrðar av hoyggi. Tann vídd, sum gav hoyggj til eina tílíka sátu, róptist eitt sátulendi (700 m$^2$) og var vanliga tað sama sum 2 tunnulendi. – At sláttumaður ein dag skuldi sláa 3 sátulendi, var vanligur setningur til eftir ár 1900. Í einari bygd (N.) sigur gamal bóndi, at soleiðis var har, tá ið hann var ungur, og tá nýttu teir enn líggjan av fornum sniði, sum umrøddur er í hesum broti. Ein annar heimildarmaður (K.)

1) Ein tummi = 2,615 cm.
2) Ein byrða av hoyggi = 50 kg.

sigur, at hann visti um eitt stykki í bønum í grannabygd, sum var 4 sátulendi til víddar, og sum fleiri høvdu roynt at sligið ein dag mest sum til roysnis, men hann visti bert um ein sláttumann, sum hevði fingið hetta frá hondini sum dagsverk. Í hansara egnu bygd høvdu sláttumenn eisini roynt at sligið eitt stykki uppá 4 sátulendi ein dag, men hann visti einki um, at nakar hevði kunnað gjørt tað. Eftir hesum at døma, hevur dagsverkið hjá sláttumanninum í summum førum verið at sligið so mikið ein dag sum til 9 byrðar av hoyggi, í øðrum til um leið 7 byrðar. Og her er roknað við, at menn nýttu hin gamla heimagjørda líggjan at sláa við.

### 8. *Kvøldsetningar.*

Kvøldsetningur ella kvøldsgerð var tað arbeiði, sum eitt vaksið fólk skuldi fáa úr hondum greitt eitt vetrarkvøld. Tá var kvøldið roknað frá nóni, klokkan 3 seinrapartin, og til klokkan 9 á kvøldi (H.—K.).

Tey arbeiði, sum nevnd verða í hesum sambandi, eru at *raka neytshúð, raka seyðaskinn, fletta* og *elta tálg*.

Tá ið menn fyrr rakaðu neytshúð, so lá tað petti av húnni, sum hann rakaði, á knænum, vanliga á høgra knæi, og niðan á lærið. Maðurin rakaði við hvøssum knívi eitt petti í senn oman móti knænum og førkaði so húnna. Somuleiðis varð gjørt, tá ið ein rakaði seyðaskinn; tá høvdu menn altíð brotið brókina so langt niðan, at skinnið lá niður á bert lærið, tí tá var slættari undir og betur gekkst at raka. Í skurðtíð heilt til um ár 1900 og eftir tað við var allur skurðurin, sum kom til garðs, vanliga flettur sama kvøldið. Hetta var neyðugt, tí somu menn gingu á fjall dag um dag. Hetta var ein tann strævnasta tíðin hjá teimum, sum gingu fjøllini, fyrst at reka seyð í rætt, so skuldi hagreiðast, og í mongum førum skuldi seyðurin beinast langa leið til húsa heim; so at býta og fletta, og aftur á fjall dagin eftir. At skera og elta tálg var strævið vetrararbeiði (Joensen 1960 og 1964).

Kvøldsetningur var at raka eina neytshúð, at raka 10 seyðaskinn ella at fletta 10 seyðir (H. — N. — K.), og vóru hesir 3 kvøldsetningar mettir at vera javnir, og umframt hesar 3 verður eisini nevnt, at kvøldsetningur var at skera og elta eina tálgavág (72 merkur = 18 kg) (H.). —

Í teimum arbeiðum, sum her eru nevnd, veldst sjálvandi um, hvussu raskur og hvussu dugnaligur maður var at greiða setningin væl úr hondum. Tað kann tykjast okkum stórur kvøldsetningur afturkomin av fjalli at fletta 10 seyðir og so aftur á fjall dagin eftir. Í ritgerð, sum farin er til prentingar (Joensen 1964), havi eg viðgjørt hetta mál gjølla, og skal her bert vísast á, at enn liva menn, sum hava flett 10 seyðir og stundum meir sama kvøldið, sum teir høvdu verið á fjalli eftir skurðinum. Og tá ið her verður nevnt at fletta 10 seyðir sum kvøldsetning, roknast við tí hátta-lagi, sum nýtt varð, tá ið teir flettu á roykstovugólvi við ongum øðrum ljósi enn koluni. Og tá fór flettingin fram hjá hvørjum manni sær líka frá byrjan til enda, so at hon gav meiri arbeiði, enn mangir menn nú geva sær stundir til, tá ið teir fletta. Ein heimildarmaður (K.) sigur, at bert einaferð hevði hann kannað eftir, hvussu skjótt hann fletti, og tað var um ár 1910. Tá fletti hann sjey meðallomb (krovið vigaði um leið 15 kg) tveir teir fyrstu tímarnar. Ein annar (N.) sigur, at hann hevði flett 8 meðallomb tveir teir fyrstu tímarnar, tá ið hann var í bestu árum og aftur komin av fjalli. Báðir siga, at gamli kvøldsetningurin hjá fjallmanni at fletta 10 seyðir ikki kundi roknast at vera ov mikið, um raksturin hevði gingist toluliga.

### 9. *Barnasetningar.*

Eisini børnini fingu setning settan í farnari tíð, tá ið arbeitt varð heima við hús. Úr einari bygd (Kf.) verður sagt, at smádreingir fingu eina hálva mørk (um leið 125 g) av ull at karða og spinna. Tað var byrjunarsetningurin, tá ið dreingir skuldu læra seg at spinna. Síðani varð nørt

um setningin, til teir dugdu eins væl at spinna og teir tilkomnu spunamenninir. Úr aðrari bygd (N.) verður sagt, at vanligur setningur hjá smágentu var ein troyggjuerma ella tvær at binda ein dag, alt eftir aldri og arbeiðsevnum hjá gentuni. Østberg (1922) nevnir, at setningurin fyri børn var settur teimum í mun til, hvussu mikið tey vóru hildin at kunna greiða úr hondum. Ein smádrongur fekk nakrar merkur at tvinna, ein smágenta eina ermu at binda, og ein størri genta tvær ermur at binda ein dag.

### *10. Staðbundnir setningar.*

Tað tykist, at føroyingar fyrr í dagliga arbeiðinum, har tað yvirhøvur var møguligt, hava sett setning fyri, hvat arbeiði skuldi fáast úr hondum greitt av hvørjum einstøkum ein dag. Sum tað sæst, hava summir setningar verið toluliga *eins um alt landið*, og best hevur ligið fyri, at setningurin kundi vera toluliga javnur víðan um, tá ið tað ráddi um at spinna, veva, binda og royta fugl. – Men í mongum førum útiarbeiði viðvíkjandi hava líkindini verið so ójøvn, at setningarnir hava verið heilt ójavnir, og at talan verður um *staðbundnar setningar*. Her skal nevnast eitt tílíkt dømi. Sagt verður (N.), at tá ið teir skuldu bera oman torv á Skorini, so høvdu teir fastan setning, hvussu mikið ið skuldi berast upp á hvørt fólkið ein arbeiðsdag. Á hesum staði skuldi torvið berast í leypi av Skorini í erva, sum er um leið 250 metrar yvir sjóvarmálanum og oman gjøgnum brattlendi, niður um 4 stíggjar, har ein eitur Togstíggjur, og oman á Lutastaðin á Syðratanga, haðani teir seinri skuldu føra torvið til húsa heim. Borið varð til møtis, og konufólkini vóru niðast, har frægast var at ganga. Setningurin var í hesum føri, at 10 leypar skuldu berast oman um dagin upp á hvørt fólkið, kvinnu sum mann. Á nevnda staði bóru teir torvið oman á Syðratanga til í 1896, tá ið teir bygdu sær rennistrong at flyta torvið oman við. Tá ið hann var komin, var setningurin ein dag at bera 20 leypar av torvheiðunum og til rennistreingin.

## SUMMARY

Information from books mentionned in the Bibliography as well as my own notes, which I owe to old people from some villages (see footnote on page 63), provide the material for this paper.

The pattern of life and work in the old Faroese peasant community had been practically unchanged for centuries when, in the middle of the 19th century, changes set in, especially after 1870 when the Faroese had begun fishery from decked vessels.

In older days the work was organized in such a way that male and female servants were ordered to perform a certain amount of work a day. They were as well ordered to perform a certain amount of work for a winter evening. These works were known under the names of »dagssetningur« and »kvøldsetningur« respectively (what has been set up for a *day's* work, and what has been set up for an *evening's* work).

This paper gives an account of »setningar« with regard to carding, spinning, knitting, weaving, cultivating, turf=cutting, bird=plucking, hay=cutting, corn=cutting, »at ripa« (pressing the straws of the barley through the teeth of a special comb in order to wrench off the ears), »at lata av sorni« (preparing the corn for milling), »at raka neytshúð« (removing the hairs fram the cow's hide), »at raka seyðaskinn« (removing the hairs from the sheep's skin), slaughtering, and kneading tallow. Finally »setningar« for children are mentionned, and it is pointed out that whenever possible it has been decided by »setningar« how much work was to be done a day. As to outdoor work the working conditions were very unlike over the islands so that the »setningar« could not be identical, which leads to »setningar« attached to localities. An ex=ample is to be found in the paper.

## BÓKMENTIR

1. Álmanakki 1963. 35. árg. Ritstjóri: John Davidsen. Tórshavn 1962.
2. *Bruun, Daniel*: Fra de færøske Bygder. København 1929.
3. *Dahl, S.*: Um tíðarfesting av føroyskum fitisteinsfundum. Fróð=skaparrit. 4: 61, 1955.
4. *Debes, Lucas Jacobsøn*: Færoæ et Færoa Reserata. Kiøbenhavn 1673. Nýggj útgáva greidd til prentingar av Einar Joensen. Tórshavn 1950.
5. *Degn, Anton*: Oversigt over Fiskeriet og Monopolhandelen 1709–1856. Thorshavn 1929.
6. *Degn, Anton*: Færøske Kongsbønder. Tórshavn 1945.

7. *Evensen, A. C.*: Stavingarbók og lesibók fyri yngri børn. Keyp=mannahavn og Kristiania 1907.
8. 14. September, nr. 39, 1962.
9. *Hansen, Maria Skylv*: Gamlar Gøtur. Siðir–Sagnir–Søgur. Tórs=havn 1950.
10. *Jacobsen, Hans Michael*: Gamal føroyskur vevur. Varðin. 8. bind, bls. 187–191. Tórshavn 1928.
11. *Jacobsen, M. A.* og *Matras, Chr.*: Føroysk–Donsk Orðabók. Tórs=havn 1961.
12. *Jirlow, Ragnar*: Drag ur färöskt arbetsliv. Rig. 14. 1931. Stock=holm 1931.
13. *Joensen, Robert*: Greivabitin. Klaksvík 1960.
14. *Joensen, Robert*: Býta og fletta. (í prenti).
15. *Jonsson, Sixten* og *Linnman, Nils*: Färöarna – fåglar–fångster. Stock=holm 1959.
16. *Landt, Jørgen*: Forsøg til en Beskrivelse over Færøerne. Kjøben=havn 1800.
17. *Marwick, Hugh*: Orkney. London 1951.
18. *Matras, Chr.*: Atlantssiðir – Atlantsorð. Fróðskaparrit (Annal. societ. scient. Færoensis). 7: 73, 1958.
19. *Petersen, Ludvig*: Sandavágs søga. Tórshavn 1963.
20. *Rasmussen, R.*: Sær er siður á landi. Tórshavn 1949.
21. *Svabo, J. Chr.*: Indberetning fra en Reise i Færø 1781 og 1782. Udgivet af N. Djurhuus. København 1959.
22. *Tarnovius, Thomas*: Færøers Beskrifvelser 1669. Utgitt av H. Hamre, København 1950.
23. *Weihe, A.*: Søga og Søgn. Tórshavn 1933–34.
24. *Østberg, Kristian*: Norsk Bonderet. Tredje Bind. Hamar 1922.